# Vesturvón keypt enn ein partrolara

**Reiðaríið hjá Vesturvón í Sørvági hevur keypt partrolaran Smaragd úr Runavík. Vesturvón skal brúka fiskiloyvið til annað trolaraparið, felagið frammanundan eigur**

SKIPAKEYP
*Edvard Joensen*

**Saltangará:** Enn ein partrolari er seldur til Sørvágs. Og aftur er tað Vesturvón, sum hevur keypt. Hesaferð er tað Smaragd, sum keyptur er.

– Vit hava keypt loyvini, og so fylgdi eitt skip við, sigur reiðarin.

Vesturvón hevur keypt Smaragd fyri at fáa hendur á fiskiloyvinum, sigur Ólavur Petersen, reiðari. Hann sigur, at ætlanin er at flyta fiskidagarnar hjá Smaragd, sum eru 201 í tali, yvir á Akranes, sum Vesturvón frammundan eigur. Akranes samtrolar við Dragasundi, sum Vesturvón eisini eigur. Hvat teir hava givið fyri skipið, vil hann ikki upplýsa.

Ólavur Petersen sigur, at teir fara at royna at selja Smaragd, sum í løtuni liggur við bryggju í Runavík. Smaragd partrolaði fyrr saman við Brillant, sum er av sama slagið, bygdir í gamla Eysturtýsklandi.

Brillant varð fyri nakað síðan seldur til Leirvíkar. Tað var reiðaríið Sjóborg, sum keypti við sama endamáli, sum Vesturvón nú hevur keypt Smaragd.


*Smaragd liggur rætiliga óvirkin í Runavík. Nú er hann seldur, og fiskidagarnir verða brúktir av øðrum skipi*

*Mynd: Edvard Joensen*

At flyta fiskidagarnar yvir á betri skip.

Annars sigur Ólavur Petersen, reiðari á Vesturvón, at tað hevur gingið hampiligt hjá Vesturvón, sum í løtuni er í Barentshavinum. Mánadagin var hann inni og bunkraði, og tá hevði hann 241 tons av flaki inni. Teir fóru avstað tann 13. januar.

Eisini hjá partrolarunum hjá reiðarínum hevur gingið hampiligt í vár, hóast tað hevur viðrað illa, sigur Ólavur Petersen.

Pørini, Vesturvón eigur, eru Akranes og Dragasund, og Akraborg og Varðborg.

# Ferðaráðið havt sín fyrsta fund

**Nýggja Ferðaráðið, sum er valt eftir lógini um Ferðaráð Føroya, ið samtykt varð í december í fjør, hevði í gjár sín fyrsta fund**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Fyrrapartin i gjár hevði nýggja Ferðaráðið sín fyrsta fund. Talan er um nýtt ráð, sum er dupult so stórt sum tað stýrið, ið áður sat.

Eftir nýggju lógini um Ferðaráð Føroya, sum kom í gildi í december í fjør, er Stýrið fyri Ferðaráðið, sum taldi tríggjar limir, nú skift út við Ráðið fyri Ferðaráðið. Limatalið er nú tað dupulta. Seks limir.

Nýggja ráðið verður valt bæði av vinnuni og av umsitingini. Landsstýrismaðurin við vinnumálum útnevnir so formannin millum ráðslimirnar.

Í nýggja Ráðnum fyri Feðraráðið sita Marita Danielsen, sum vald er at umboða ferðasmiðirnar.

Petur Martin Petersen umboðar økisferðavinnufeløgini.


*Nýggja Stýrið fyri Ferðaráðið hevði sín fyrsta fund í gjár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jóannes á Váli umboðar flutningsfeløgini.

Ása Johnsdóttir umboðar hotel- og matstovuvinnuna.

Elna Skylv Hansen umboðar mentamál, og

Hans Joensen er valdur av Vinnumálastýrinum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur útnevnt Maritu Danielsen til formann fyri Stýrið fyri Ferðaráðið.

# Bussur koyrdi útav

**Seinnapartin mánadagin koyrdi ein bussur hjá Bygdaleiðum út av vegnum á veg til Klaksvíkar**

KAVI
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Talan var tíanbetur ikki um nakað stórvegis óhapp, tá bussurin hjá Bygdaleiðum koyrdi út av tunnilsvegnum á veg aftur til Klaksvíkar.

Bussurin hevði verið í Hvannasundi, og var á veg inn í tunnilin í Árnafirði, tá ein bilur kom ímóti honum. Nógvur kavi lá á vegnum, og av tí sama sá bussførarin ikki, hvar vegurin lá.

### Sá ikki vegin

- Tað kom eitt grovt kavaæl, og allir prestarnir við vegkantin vóru undirkavaðir. Tí sá eg ikki, hvar vegurin lá, men royndi eftir besta førimuni at snara út á vegkantin, so bilurin og bussurin ikki rendu saman. Eg sá, at landsverkfrøðingurin hevði grivið eitt fitt petti inn móti vegkantinum, og valdi tí at snara bussinum tann vegin, greiðir bussførarin frá.

- Men tíanverri hevði landsverkfrøðingurin grivið alt ov langt inn, so bussurin endar úti av vegnum. Eg veit, at aðrir bilar eisini hava gjørt sama feilin og hava fylgt slóðini hjá landsverkfrøðinginum. Av tí sama eru teir eisini endaðir úti av vegnum, og er tað sera óheppið, sigur bussførarin.

Men han leggur afturat, at landsverkfrøðingurin ikki skal fáa nakra skuld av óhappinum.

- Teir síggja jú heldur ikki, hvat vegurin endar. Teir royna jú bert at gera teirra arbeiði.


*- Eingin skaði stóðst av óhappinum seinnapartin mánadagin. Bert eitt ferðafólk var í bussinum, tá óhappið hendi*

### Eingin skaði

Bert eitt ferðafólk var í bussinum, tá óhappið hendi, og tíanbetur stóðst eingin skaði av tilburðinum.

Landsverkfrøðingurin var skjótur á staðið og fekk sloypað bussin upp, sum síðani kundi halda fram á leið síni.



# Nú skal Smyril sigla til tíðina

**Strandferðslan er í ferð við at gera nýggja ferðaætla, sum skal vera einfaldari enn tann, sum nú er í gildi, samstundis sum dentur skal leggjast á at fáa bátarnar at sigla til tíðina**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Nýggja ferðaætlanin hjá Strandferðsluni skal vera einfaldari enn tann, sum nú er í gildið og so skulu bátarnir sigla til tíðina.

Tað er tvey høvuðsendamál, nú Strandferðslan er í ferð við at gera nýggja ferðaætlan.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at tey hava sett sær fyri, at nýggja ferðaætlanin skal koma í gildi 8. apríl, beint eftir páskir.

– Tað er fyri at sleppa undan at hava tær páskahøgtíðir í ferðaætlanini, har hom skal broytast.

Hann sigur, at broytingar í ferðaætlanini elva til fløkju og at tað er óheppið at byrja eina nýggja ferðaætlan við broytingum, tí kemur hon ikki í gildi, fyrrenn beint eftir páskir, so at broytingar bara skulu lýsast á páskum næsta ár.

Í løtuni verður arbeitt við at avgreiða ferðaætlanina til prentingar.

### Luft og einfeldni

Annars sigur Reidar Nónfjall, at rættiliga nógvar broytingar eru í nýggju ferðaætlanina, sum kemur.

– Nú, vit leggja nýggja ferðaætlan, hava vit tikið alla ferðaætlanina í botn og hugt eftir, hvar vit kunnu gera ábøtur.

– Eg haldi, at tað er nógv spennandi í nýggju ferðaætlanini og hon er løgd í neyvum samstarvi við tey ymsu økini í landinum og vit bussar o.s.fr.

– Hann sigur, at tveir málsetningar, sum Strandferðslan hevur sett sær fyri er, at nýggja ferðaætlanin skal vera einfaldari enn tann, sum nú er, og at skipini skulu sigla til tíðina.

– Fráferðirnar ymsastaðni frá, skulu ikki so fastar tíðir, sum gjørligt.

Eitt nú siglir Smyril av Havnini til Suðuroyar heilar fimm ymiskar tíðir um kvøldið. Okkurt kvøld siglir hann kl. 17.30, okkurt kvøld kl. 18.00, okkurt kvøld kl. 19.00, okkurt kvøld kl. 20.00 og okkurt kvøld kl. 22.30.

– Tað er ørkymlandi hjá teimum, sum skulu brúka strandfaraskipini at halda greiði á ymsum tíðum.Tí fara vit at royna at gera tað nógv einfaldari, og so vítt tað ber til, fara fráferðirnar at vera somu tíð hvørt kvøld, ikki bara á Suðuroyarleiðini, men eisini aðrastaðni, sigur Reidar Nónfjall.


*Tað er ógvuligaforargiligt hjá fólki at Smyril altíð skal verða ov seinur av Havnini. Í nýggju ferðaætlanini skal tað tí vera so mikið av luft verða ímillum túrarnar, at tað ber til at sigla til tíðina, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni*

Hann sigur, at tað er eisini ein sorur trupulleiki at ferðaætlanin er so trong, at tað ikki eyudnast at fáa bátarnar at sigla til tíðina.

Hetta munnu ikki minst tey sanna, sum plaga at sigla við Smyrli úr Havnini til Suðuroyar, tí tað greittir næstan ikki, at hann er ov seinur av Havnini.

– Hetta er ógvuliga forargiligt hjá fólki og tí hava vit sett okkum fyri at hava so frægt av luft ímillum túrarnar, at tað skal bera til at sigla til tíðina, sigur strandferðslustjórin.

– Vit royna alla tíðina, tað vit kunnu, men tað stjelur nógva tíð, at ferðslan alsamt veksur, bæði ferðafólk og bilar, ikki minst stórir bilar og treylarar, samstundis sum umstøðurnar á havnaøkinum ikki eru tær bestu og mangan skapa trongar.

– Tað er ongin meining at tað stendur í ferðaætlanini, at Smyril skal sigla klokkan 18 av Havnini, tá ið tað ongantíð eydnast at sigla, fyrrenn kl. 18.30, ella onkuntíð seinni.

– Tá er betri at lýsa, at hann siglir kl. 19 og so at hann siglir kl. 19. og ikki eitt minutt seinni, sigur hann.

# Heilsuhjálparar á skeið

FAKLIG MENNING
*Áki Bertholdsen*

Seinastu árini hevur Heilsuhjálparafelag Føroya miðvíst arbeitt fyri at styrkja og menna fakliga førleikan hjá heimahjálpum, ella heilsuhjálparum, sum tær eisini verða nevndar nú.

Eitt stórt stig á leiðini varð tikið í fjør, tá ið Almanna- og Heilsuskúlin varð settur á stovn á Tvøroyri.

Hetta var eitt hjartamál, sum Heimahjálparafelag Føroya, sum seinni fekk nýtt navn og nú kallast Heilsuhjálparafelag Føroya, hevði arbeitt fyri í fleiri ár.

Men hjá teimum, sum ganga í hendan skúlan, er starvsvenjing ein týðandi táttur í útbúgvingini. Og fyri at næmingarnir kunnu fáaí munadygga starvsvenjing, var næsta stigið hjá felagnum at útbúgva heilsuhjálpir og heilsurøktarar til at hava næmingar í starvsvenjing.

Tí hevur Heilsuhjálparafelag nú í tveimum umførum skipað fyri skeiði í at hava næmingar í starvsvenjing.

Skeiðini hava verið fyri heilsuhjálparum, heilsurøktarum og sjúkrasystrum. Munurin á heilsuhjálparum og heilsurøktarum er, at heilsurøktarin hevur eina fulla útbúgving upp á 1,5 ár, men heilsuhjálpararnir eru heimahjálpir, sum hava verið til skúlingar í nakrar mánaðir.

Eitt skeið var í fjør og eitt hevur verið í ár og tilsamans hava 50 heilsuhjálparar og heilsurøktarar tikið prógv í praktikkvegleiðing, sum tey kalla tað. Á hvørjum skeiði, sum varar í eina viku, hava 25 næmingar verið.

Ása Olsen, formaður í Heilsuhjálparafelagnum, sigur, at hetta er ein roynd hjá felagnum at menna heimahjálpina, men at ætlanin er, at í framtíðini er tað Almanna- og heilsuskúlin sjálvur,sum skal standa fyri skeiðunum av hesum slagi.


*Hetta er teir 25 næmingarnir, sum nú hava tikið prógv í praktikkvegleiðing. Tey fingu prógvini á næstseinasta fríggjadag. Hvørjumegin við standa teir báðir donsku lærararnir, Lisbeth Seitzberg og Bente Holm. Annars eru næmingarnir, Anna H. Múller, heilsuhjálpari Kvívík, Tonny Jacobsen, heilsuhjálpari Tórshavn, Judith Poulsen, heilsuhjálpari Klaksvík, Helena Weihe, heilsuhjálpari Søldarfjørður, Selma Gulaksen, heilsuhjálpari Klaksvík, Annika Tungá, heilsuhjálpari Klaksvík, Hildigarð Djurhuus, heilsuhjálpari Fuglafjørður, Sigrun H. Magnussen, heilsuhjálpari Runavík, Helena Berthelsen, heilsuhjálpari Strendur, Jørghild Eið, heilsuhjálpari Vágur, Marjun Olsen, heilsuassistent Saltnes, Mayken í Túni, heilsurøktari Toftir, Erna Hovgård, heilsuhjálpari Tórshavn, Marjun Vilhelm, sjúkrasystur Tórshavn, Marjun Michelsen, sjúkrasystur Miðvágur, Judith Árnastein, heilsuhjálpari Tórshavn, Alith Blåsvær, heilsuhjálpari Tórshavn, Sóley Haraldsen heilsurøktari Hoyvík, Tórbjørg Djurhuus, sjúkrasystur Skálavík, Sunrid Berg, heilsurøktari, Skopun, Hanne-Mi á Brúgv, sjúkrasystur Hoyvík, Einar Joensen, sjúkrasystur Klaksvík, Hildigarð Jacobsen, heilsuhjálpari Tvøroyri, Sólrun Lisberg, heilsuhjálpari Sumba og Margretha Petersen, heilsuhjálpari Sandur*